

## TUNNILSTRYGD

*Nógv ár eru liðin síðani koyrandi varð til Trøllanesar, men enn er arbeiðið ikki heilt liðugt. Ein slíkur tunnil skal eisini eftirhyggjast og tryggjast við jøvnum millumbilum. Tað arbeiðið varð somuleiðis gjørt fyrr í hesum mánaðinum í Trøllanestunlinum, sum er 2248 metrar langur*



## ASFALT

*Hóast bilarnir ikki eru so nógvir í Kalsoynni, slíta teir so líðandi uppá landsvegin. Av og á mugu vegastrekkini umvælast, og tað eru teir hjá Landsverki í ferð við nú*



## KALSOYINGUR

*Tingmaðurin fyri Sambandsflokkin, Bjørn Kalsø býr á Syðradali. Hann skal eisini við Sam til Klaksvíkar og víðari til Havnar, har fundur skal vera í fíggjarnevndini.*
*– Vælkomnir í oynna, var heilsan hansara til miðlafólkini. - Gott at tit eisini hugsa um okkum*



## SEIÐABERG

*Hennibeth Kalsø er farin oman á støðna við ferjuleguna í Syðradali, saman við soninum. Við sær hava tey tráðuna, og við sær hava tey eisini eina vón um at okkurt verður at fáa hesa løtuna*

## MIKLAR KVINNUR

*Fólkatalið í Mikladali hevur fylgt gongdini á so mongum øðrum útoyggjum - tað hevur verið minkandi. Seinastu hagtølini vísa, at í bygdini búgva einans 32 fólk, harav flestu teirra eru kvinnur. Tær eru 19 í tali, meðan menninir altso bert eru 13. Í 1993 búðu 66 fólk í Mikladali*